ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 6. oktober 2009

# Nú er bara HB eftir

**At KÍ nú flytur niður í næstbestu deildina, staðfestir samstundis tann søguliga veruleika, at nú er bara HB eftir av teimum liðunum, sum hava verið við í landskappingini uttan slit síðani 1942. Tann seinasti klassikarin í føroyskum fótbólti verður ongantíð tann sami aftur**


einslistir@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen




Seinasta meistaraheitið hjá KÍ varð vunnið í 1999. Hetta var næsta FM-heitið í nærum 30 ár

Savnsmynd

Neyvan kann sigast annað, enn at tað veruliga var lagnunnar speisemi, at HB næstsíðsta sunnudag sendi KÍ niður í næstbestu deildina, samstundis um HB vann sítt tjúgunda føroyameistaraheiti í mansfótbólti, sum hjá høvuðsstaðarfelagnum er ein øking av egnum meti.

Í landskappingarhøpi hava hesi bæði verið avgjørt tey størstu, tí tey hava vunnið nógv fleiri meistaraheiti enn nøkur av øllum hinum føroysku fótbóltsfeløgunum. Men tað hevur tó fyri tað mesta verið í hvør sínari tíð – næstan sum »fyrr og nú« – at tey hava verið stórmaktir.

KÍ var oddafiskur frá fyrstu løtu, tá fyrsta landskappingin í fótbólti var í 1942, og áðrenn HB vann sítt fyrsta meistaraheiti í 1955, hevði KÍ longu verið meistari fimm ferðir. KÍ helt fram við at vinna við jøvnum millumbili og onkrum háli, eitt nú við tiltikna 66-liðnum, og tá KÍ í 1972 kom upp á meistaraheiti nummar 15, hevði HB bert verið meistari seks ferðir.

## Bert HB eftir

Tá kom stígur í hjá klaksvíkingum, og í staðin hevur HB síðani havt sína stórheitstíð, ið nú var krýnd við tí tjúgunda meistaraheitinum. Tað tók kortini sína tíð at taka KÍ, tí ikki fyrr enn í 2002 fór HB framum og hevði vunnið fleiri landskappingar enn KÍ. Men í nýggju øldini hevur yvirhøvur hildnast væl hjá HB, sum hevur vunnið fimm meistaraheiti bara hesi síðstu átta árini!

HB og KÍ eru javnaldrar, tí bæði feløgini eru sett á stovn í 1904, men tó byrjaði KÍ ikki við fótbólti fyrr enn í 1911. Men tá kappingin um føroyameistaraheitið kom í 1942, var KÍ beinanvegin til reiðar og vann longu fyrsta árið. Hinvegin kom HB ikki »á talvuna«, fyrr enn tað fylti 51 ár.

Spælt hevur verið øll árini síðani 1942, uttan í 1944, tá kríggið gjørdi, at trot var á bóltum, og at tað tí bar illa til at fáa avgreitt nakra kapping. Frá 1976 hevur landskappingin stórt sæð verið skipað, soleiðis sum vit kenna hana í dag, við upp- og niðurflyting millum deildir, alt eftir úrtøkuni.

Síðani henda skipan kom, eru upprunaliga feløgini frá 1942 fallin frá, eitt fyri og annað eftir, og í mong ár hava bara HB og KÍ verið eftir, sum enn ikki hava vikið plássini á ovastu rók. Nú KÍ fall, er so bara HB eftir, ið enn ikki hevur roynt niðurflyting ella av øðrum ávum er farið úr bestu mansdeildini.

## Langt ímillum

At KÍ nú ikki longur megnaði at halda fast í serstøðuni, er kanska ikki so øgiliga óvæntað, tí langt hevur verið millum tey stóru úrslitini hjá besta mansliðnum, og seinnu árini hevur talan beinleiðis verið um vandasjógv. Í fjør eydnaðist akkurát at halda liðnum uppi, og sjeyndaplássið í fyrraárið var neyvan tað, norðoyingar ynsktu sær, tí málið hevur altíð verið sett ríkiliga høgt.

Síðsta føroyameistaraheitið liggur afturi í 1999, tá KÍ við Tony Paris á odda enntá vann greipuna, og eftir tað var frægasta úrslitið í 2002, tá KÍ vann bronsu. Men samanborið við fyrstu árini hjá KÍ – og ikki minst samanborið við HB – hevur í mong ár verið sera langt millum snapsirnar, sum tikið verður til.

Hagtølini gjøgnum árini staðfesta greitt, at HB er nógv mest vinnandi felag gjøgnum allar tíðir í føroyskum fótbólti, tí havast skal í huga, at umframt øll meistaraheit-ini, so hevur HB vunnið steypakappingina heilar 26 ferðir, síðani farið var undir hana í 1955, tá HB eisini vann ta fyrstu av sínum 12 greipum.

Hjá mongum er tað við sorgblídni, at biðið verður KÍ farvæl í bestu mansdeildini. Og hóast tey í HB ríða á aldukambinum í hesum døgum, man tað ikki vera minst har, at saknur verður í KÍ, nú seinasti klassikarin í føroyskum fótbólti er farin í søguna – og so hendi tað enntá júst í hesum sama klassikara, ið ongantíð aftur verður tann sami…



Bara síðani aldarskiftið hevur HB vunnið fimm meistaraheiti. Tað seinasta av hesum sunnudagin

Mynd: Álvur Haraldsen

### FM 1942-2009 HB-KÍ

| HB | KÍ | |
|---|---|---|
| | 1942 | 0-1 |
| | 1945 | 0-2 |
| | 1952 | 0-3 |
| | 1953 | 0-4 |
| | 1954 | 0-5 |
| 1955 * | | 1-5 |
| | 1956 | 1-6 |
| | 1957 | 1-7 |
| | 1958 | 1-8 |
| 1960 | | 2-8 |
| | 1961 | 2-9 |
| 1963 * | | 3-9 |
| 1964 * | | 4-9 |
| 1965 | | 5-9 |
| | 1966 * | 5-10 |
| | 1967 * | 5-11 |
| | 1968 | 5-12 |
| | 1969 | 5-13 |
| | 1970 | 5-14 |
| 1971 * | | 6-14 |
| | 1972 | 6-15 |
| 1973 * | | 7-15 |
| 1974 | | 8-15 |
| 1975 * | | 9-15 |
| 1978 * | | 10-15 |
| 1981 * | | 11-15 |
| 1982 * | | 12-15 |
| 1988 * | | 13-15 |
| 1990 | | 14-15 |
| | 1991 | 14-16 |
| 1998 * | | 15-16 |
| | 1999 * | 15-17 |
| 2002 | | 16-17 |
| 2003 | | 17-17 |
| 2004 * | | 18-17 |
| 2006 | | 19-17 |
| 2009 | | 20-17 |

* greipuvinnari (12-3)